# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# PRÍSHÆKKING Í JÓLAVÁGU

Tað var vorðið sum jólagáva at fáa frá meiralutanum av føroysku kommununum, at vit nú skulu gjalda 19 oyru meira fyri kilowatttíman av streymi. Miðal eyka útreiðslan fyri húskið er 3.000 krónur um árið.

Vit kunnu bara taka undir við Tórshavnar kommunu og Heðini Mortensen, borgarstjóra, í kravinum um, at SEV skal hyggja í seg sjálvt. Tað er marghátttligt, at ein vinnufyritøka sum SEV ikki aktar boðini frá eigaranum um at koma við eini nýggjari ætlan – tá eigarin á aðalfundi vrakar ta ætlan, sum leiðslan er komin við. Bara at koma við somu ætlan einaferð enn vísir eina totala arrogansu. Tað er eftir øllum at døma ikki eigarin, sum ræður í SEV, men í alt ov stóran mun nevnd og leiðsla.

Hetta er eisini eitt dømi um, hvussu illa tað kann ganga, tá politikarar skulu fáast við vinnu. Teir eru vanir at leggja skattir og avgjøld á fólk. Teir hava eftir øllum at døma ikki tað jørðforbindilsið, sum skal til fyri at duga at skilja, at ein vinnufyritøku bæði hevur eina inntøkusíðu og serliga eina útreiðslusíðu, sum kann regulerast. Tað ber til at reka eina vinnufyritøku bíligari. Tak Føroya Tele, tak Posta - almennar fyritøkur, sum eru lagdar í partafeløg. Hesar fyritøkur og aðrar við hava sagt fólki upp og útsett ella avlýst út- og umbyggingar. Aðrar fyritøkur við hava umlagt lán og gjørt reguleringar fyri at kunna reka virksemið bíligari og við færri fólkum. Hví kann SEV ikki gera tað?

El-prísurin hevur so stóra ávirkan á alt samfelagið, at hetta kann berast saman við eina stóra skattahækking hjá bæði vinnuni og privatfólki. Hetta rakar alt samfelagið so sera meint. Tí hvílir ein stór ábyrgd á hesum lokalpolitikarum, sum hava tikið hesa avgerð. Og so hava teir eisini lovað okkum somu jólagávu næstu tvey jólini!

Tað eru jú vit øll - brúkararnir - sum eiga SEV. Vit ynskja okkum, at hesin hesin tungi almenni monopolstovnurin reisist og vísir vilja í verki. Latið tildømis onnur sleppa at framleiða streym á netið hjá SEV - sum enntá vilja gera tað bíligari. Vísið í verki, at tit veruliga vilja geva stovninum ta kapping, sum skal til fyri at tryggja effektivitet og framburð.



Vit ynskja okkum ikki óneyðugur hækkingar. Og skal talan verða um hækking, so er ikki at taka so rívan til men vísa varsemi, eins og við sáttmálanum sum kommunarnar júst hava gjørt við alment sett starvsfólk.

Og so ynskja vit øllum eini gleðilig jól!

## Ynskja ikki fleiri slíkar jólagávur frá kommununum

# Besta nýggjársgávan

**Á hvørjum ári til jóla síðani 1989 hava føroyingar kunnað ognað sær bókina SKEMT við tekningum hjá Óla Petersen. Hesi jólini verða tó eitt undantak, og tað er ein orsøk fyri hesum**

Jan Müller



*Óli P ynskir øllum føroyingum eini góð jól*

Tað var við beráddum huga, at Skemt 2010 gjørdist jólatrøll. Ístaðin fyri at gerast tann stuttligasta jólagávan í ár, verður hon nú til ta bestu og og mest hugvekjandi nýggjársgávuna í januar 2011. Um somu tíð sum hon verður eitt søguligt yvirlit yvir hendingar í farna árinum, fer hon eisini at taka samanum øll tey mongu árini Óli Petersen hevur teknað baksíðuna á Sosialinum.

Listamaðurin og skemtiteknarin Óli Petersen verður 75 ár 24. januar, og tað er í hesum sambandi, at útgevarin hevur gjørt av at geva Skemt 2010 og havið ta 22. í røðini av Skemtbókum út til sjálvan føðingardagin.

Bókin verður tí eisini ein jubileumsbók, har listamaðurin verður heiðraður við einum serstøkum íkoyti til bókina.

Nú so nógvar bøkur koma út til jóla, man tað eisini vera kærkomið fyri øll heim í Føroyum at fáa eina spildurnýggja og feska bók í januar eisini, møguliga og helst tann fyrsta føroyska bókin í nýggja árinum. Harvið er hon eisini ein forkunnug føðingardagsgáva til samfelagið Føroyar, nú tá hol verður sett á eitt spildurnýtt ártíggju við vónandi mongun forvitnisligum og stuttligum nýggjum tekningum frá listamanninum á Skála.

Hátíðarhald verður í Miðlahúsinum í sambandi við 75 ára dagin og 22. Jubileumsútgávuna, tá høvundin eisini fer at signera bókina.

Hjá teimum í landinum, sum ikki hava ognað sær Skemtbøkurnar, ber til á føðingardagshaldinum í Miðlahúsinum at ogna sær tær bøkur, sum framvegis eru á goymslu umframt túsundtals originaltekningar, sum ganga heilt aftur til 1989.

Til ber eisini longu nú at bíleggja sær Skemt 2010 við at senda ein teldupost til:

*jan@sosialurin.fo*



## Eiga at hava seks aðalrææð

JÓGVAN SUNDSTEIN
KJAK Á SÍÐU 34



## Standmynd við Hoyvíkstjørn

JÓGVAN ARGE
KJAK Á SÍÐU 14

# Seks fakfeløg virða ikki fakfelagsrættindi

Og so var tað Starvsmannafelagið, sum traðkaði á grundleggjandi rættindi hjá starvsfólki...

Útvarpið bar í gjár tey tíðindi, at Starvsmannafelagið, sum javnan hevur fremstafingur á lofti, tá almenn størv ikki verða lýst leys, nú sjálvt hevur brotið hesa meginreglu. Felagið hevur sett ein kunningarráðgeva í starv í eitt hálvt ár, men starvið er ikki lýst leyst. Tað eigur tað.

Og so kemur umberingin frá forkvinnuni: »at hon skilir atfinningarnar, men umstøðurnar eru serligar...«

Ja go'morin Selma Ellingsgaard.

Tað er eingin – absolutt eingin – umbering góð nokk hjá einum fakfelag sum arbeiðsgevari at bróta fakfelagsrættindi. Hetta er totalt at undirminera eksistensin hjá fakfeløgunum. Hetta vísir, at Starvsmannafelagið heldur tað vera í lagi, at arbeiðsgevarar ikki taka fakfelagsviðurskifti í álvara.

Nær eru »umstøðurnar serligar«, og hvør skal definera tað? Vit hava jú eitt aktuelt dømi um, at fimm onnur fakfeløg eisini traðka á tey mest grundleggjandi fakfelagsviðurskiftini - tá feløgini í Samtaki stuðlaðu Jan Højgaard og Føroya Fiskimannafelag við fakfelagsfiggindaligari burturvísing av skrivstovumanni hjá Fiskimannafelagnum. Samtak er enn ikki komið við nakrari umbering, og hóast maðurin nú er deyður, so er tað tað minsta kravið til hesi fakfeløgini, at tey koma við eini treytaleysari almennari umbering fyri at hava borið seg soleiðis at.

Ella ganga fakfeløgini nú á odda og traðka slóðina fyri arbeiðsgevararnar?

*Gleðilig jól*

***Sosialurin ynskir øllum lesarum, lýsarum og viðskiftafólki annars eini gleðið jól***

*Sosialurin kemur útaftur mándagin 27. desember.*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*